  

JUNI 2023

# FELAGSBYGNINGUR TIL KAMPUS

## ARKITEKTAKAPPING

## DÓMSNEVNDARÁLIT

Mynd frá *Færøernes Universitet - Strategisk Campusplan*, Heildarætlanini til Fróðskaparsetur Føroya frá 2018 , av Henning Larsen

# 1 Kampus, Felagsbygningur - Arkitektakapping

Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Landsverk bjóðaðu í februar 2023 hesum undangóðkendu ráðgevum at luttaka í framhaldandi tilgongdini at gera uppskot til nýggjan felagsbygning á Kampus:

**Sp/f Kontrast og COBE**
**MAP Arkitektar**
**Henning Larsen North Atlantic**
**SNA**
**Zeta Arkitektar & Brim Arkitektar**
**Arkitektar99 og BIG**

Grundarlagið fyri hesa kapping er "Heildarætlanin frá 2018 *Færøernes Universitet – Strategisk Campusplan"*, har felagsbygningurin er ein av bygningunum í ætlanini.

Tá ið innlatingarfreistin var úti, tann 31. mai 2023, vóru seks uppskot latin inn. Øll innkomnu uppskot luku treytirnar og eru tey øll gjølla viðgjørd í dómsnevndini, hvørs samrøður og metingar eru samanskrivaðar í hesum nevndaráliti.

**Í dómsnevndini vóru:**
Ólavur Ellefsen, Formaður í Stýrinum á Setrinum – Formaður í dómsnevndini
Hans Harryson, Útbúgvingarleiðari á Setrinum
Poul Geert Hansen, Aðalstjóri í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum
Birita Wardum, Býararkitektur í Tórshavnar kommunu
Nina Arge, Arkitektur á Landsverk
Thale Bjørnerheim, Fakdómari, tilnevnd av Arkitektafelag Føroya
Thomas Juel Clemmensen, Fakdómari, tilnevndur av Arkitektafelag Føroya

**Sum ráðgevarar við ongum avgerðarrætti vóru hesir dómsnevndini til hjálpar:**
Bárður Dam í Baianstovu, Verkætlanarleiðari hjá Landsverk
Martin Zachariassen, Rektari á Setrinum
Johan Ísak Súni Hansen, Fyrisitingarstjóri á Setrinum
Carl Mouritsen, Byggifrøðingur á Viðlíkahaldsdeildini hjá Landsverk
Páll Magnus Dam í Baianstovu, Lesandi á Setrinum
Vilhjálmur D. Jacobsen, Ráðgevi innan burðardygd

**Skrivari hjá dómsnevndini var:**
Lilja Thorsteinsson

**Fulltrúi hjá Landsverk var:**
Kristian Mohr Heen

Dómsnevndin var saman frá mánadegnum 5. juni til hósdagin 8. juni og høvdu hølir í Nóatúni, við byggiøkið. Á fyrsta fundi skipaði nevndin seg við Ólavi Ellefsen sum formanni.

Í kappingarskrivinum varð boðað frá, at uppskotini fóru at verða dømd eftir hesum fortreytum, sum tó ikki vóru at skilja sum ein raðfesting:

- Atdráttarmegi og stimbrandi lestrarumhvørvi
- Funktionalitet og smidligheit
- Samanspæl við nærumhvørvi
- Arkitektonisk hugsjón og dygd
- Sosial, umhvørvislig og fíggjarliga burðardygd

## 2 Dómsnevndarálit

Dómsnevndin heldur, at kappingin er væleydnað, og at tey seks uppskotini megna at geva eina góða mynd av teimum møguleikum og dygdum, ein nýggjur felagsbygningur fer at geva Setrinum, býnum og Føroyum.

Tey seks uppskotini vísa í felag á eina stóra breidd av møguleikum at loysa torskildu uppgávuna – at veita lesandi, starvsfólki og vitjandi eitt savnandi og stimbrandi lestrarumhvørvi. At koma við uppskot til bygning, ið bæði skal laga seg til lendið, nærumhvørvið og fjøltáttaða virksemið á Setrinum. Ein bygningur, ið skal umboða Setrið við tign og arkitektoniskari dygd og vera ein fyrimynd innan burðardygga bygging í Føroyum.

Øll uppskotini hava atdráttarmiklar eginleikar, og hevur avbjóðingin í hesi kappingini verið at gera bygningin atdráttarmiklan fyri mongu ymsu áhugapartarnar. Starvsfólkini, tey lesandi, rørslutarnað, grannar, fólk til gongu, men eisini tey við ymsum lyndiseyðkennum so sum introverd og ekstroverd.

Setrið hevur ynski um, at tann nýggi felagsbygningurin skal vera atkomuligur fyri øll og í nýtslu so nógvar dagar um árið sum gjørligt. Tað hava nøkur av uppskotunum loyst við eini sera smidligari planloysn, meðan onnur uppskot raðfesta høvuðsfunktiónirnar fram um eitt opið og smidligt flóð ígjøgnum bygningin. Ikki øll uppskot hava í nóg stóran mun tikið atlit til føroyska veðurlagið. Eisini er sambandið millum inni og úti og dygdin av útiøkjum misjavnt viðgjørt.

Nærumhvørvið hevur stóran týdning í øllum uppskotum, men er hátturin, at laga bygningin til tað, sera ymiskur. Tvey uppskot hava valt at grava seg niður í lendið fyri at gerast eitt nýtt lendi og verja grannarnar fyri mist útsýni. Onnur uppskot byggja oman á lendið, har bygningurin roynir at gera seg minni í erva og at fylgja lendinum fyri at tilpassa seg betur til umhvørvið. Økið kring bygningin ávirkast nógv av tí stóru rúmd og ger, at tað er trupult at koma til bygningin ella framvið honum. Hetta royna nøkur uppskot at loysa, við at geva atgongd uppá tekjuna, meðan onnur uppskot heldur vilja leiða fólk inn ígjøgnum bygningin.

Ynski er at fáa ein felagsbygning sum stendur reystur, uttan at leypa á. Ein bygning, ið fellur inn í býin og lendið. Sum dregur til sín, hugvekur og skapar trivnað, bæði inni og úti.
Øll hugskotini leita sær á ymsan hátt íblástur úr føroyskum byggisniði ella føroyska landslagnum. Í skapi og tilfari virða tey nærumhvørvið í størri ella minni mun. Í mun til at skapa eina heild millum støðumynd og bygning, eydnast summi uppskot betri enn onnur og eru tey meiri hóskandi sum støði undir víðari útbygging av Kampus.

Byggiharrin ynskir, at nýggi felagsbygningurin skal gera sítt til at broyta hugsanarháttin um burðardygd og at menna tey burðardyggu sjónarhornini innan byggilist í Føroyum. Í hesi fortreyt sæst ein greiður munur ímillum uppskotini og eyðsýnt er, at vit, innan evnið burðardygga bygging, eru eftirbátar í Føroyum. Hóast so, hevur ynskið um at ganga á odda á hesi leið, verið stórt og hevur hetta havt týdning í dømingini. Nøkur av uppskotunum hava gjørt royndir og kanningar innan økið, onnur hava gjørt metingar innan ymsu parametrini í eini burðardygdarætlan, meðan onnur tykjast nærum hava gloymt at viðgera evnið.

# 3 Niðurstøða

Við einari gjøllari meting av øllum uppskotunum við grundarlag í teimum fimm fortreytunum velur dómsnevndin

**uppskot nr. 78912 - KAMPUS FRÆLSI - Henning Larsen North Atlantic**

sum vinnara av kappingini.



Dómsnevndin hevur avgjørt at lata hesar virðislønir:

**1. virðisløn á kr. 500.000 til uppskot nr. 78912 við heitinum KAMPUS FRÆLSI *(Henning Larsen North Atlantic)***

**2. virðisløn á kr. 400.000 til uppskot nr. 35813 við heitinum NÓATÚN *(Sp/f Kontrast og Cobe)***

**3. virðisløn á kr. 350.000 til uppskot nr. 15181 við heitinum KAMPUSGJÓGV *(Arkitektar99 og BIG)***

samsýning á kr. 250.000 til uppskotini, nevnd í talvirðisligari raðfylgju:

**uppskot nr. 09052 við heitinum Felagsbygningur til Kampus - MILLUM GARÐARNAR *(SNA)***
**uppskot nr. 31122 við heitinum NÓAHEYGGUR *(ZETA Arkitektar & Brim Arkitektar)***
**uppskot nr. 65159 við heitinum KAMPUS *(MAP Arkitektar)***

Afturat hesum fáa øll seks uppskotini samsýning á kr. 40.000 fyri innlatin modell.

Nágreinað meting av øllum uppskotunum finst undir grein 4*. Meting av teimum einstøku uppskotunum*.

# 4 Meting av einstøku uppskotunum

**1. virðisløn: uppskot nr. 78912 KAMPUS FRÆLSI (78912) – Henning Larsen North Atlantic**

Hetta uppskot er háttað sum ein røð av bygningum við mønutekju, sum eru settir saman og forskotnir inn í hvønn annan. Arkitektoniska hugsjónin er at skapa ein býling heldur enn ein stóran bygning. Íblásturin er úr siðbundna føroyska býlinginum og langhúsunum frá víkingatíðini. Hesin byggileistur gevur møguleika at fylgja lendinum, at niðurbróta støddarlutfallið og at laga seg eftir nærumhvørvinum. Bygningurin verður staðsettur við virðing fyri góðskuni í verandi landslagi, ið verður varðveitt sum uttandura uppihaldsrúm. Innan er bygningurin skipaður við trappu-/gøtuleið og miðtorgi, sum saman dána ein natúrligan snúningsdepil fyri fjøltáttaða virkseminum á  Setrinum.

Rúmliga og programmatiskt er felagsbygningurin skipaður soleiðis, at tryggjað verður eitt stórt og fjølbroytt lestrarumhvørvi við mongum óformligum lestrarplássum. Óformliga eyðkennið verður stuðlað av virkissamansetingini.

KAMPUS FRÆLSI vinnur kappingina, tí uppskotið svarar á ein sannførandi hátt teimum fimm høvuðsfortreytunum í kappingarskránni:

- Byggingin hevur við sínum greiða bygnaði og skarpleitta skjøldri eina eyðkenda vangamynd við stórari atdráttarmegi. Uppskotið er innbjóðandi og ger týðiliga vart við seg í býarmyndini uttan at vera áleypandi. Siðbundnar byggitøkniligar dygdir verða tulkaðar og nýttar at leggja eina burðardygga kós í menningini av Setrinum.

- Bygningurin er karmur um eitt stimbrandi lestrarumhvørvi við stórum fjølbroytni, bæði í samband við arbeiðspláss og sansaligari góðsku. Byggingin fevnir bæði stórum tiltøkum og meiri inniligum arbeiðsstøðum. Sjónliga sambandið millum ymsu bygningspartarnar, stuðla uppundir upplivingina av Setrinum sum ein felags karmur.

- Yvirskipaða arkitektoniska hugtakið rúmar stórum virkisligum smidleika. Hetta verður mett at vera ein dygd, bæði í tilrættislegging av verkætlanini, í dagligu nýtsluni av bygninginum og í samband við framtíðar tillagingar og útbygging.

- Byggingin er somuleiðis løtt at tillaga til verandi umstøður og tað undandrag, sum verandi bygningar og eitt óslætt lendi geva. Uppskotið vísir, hvussu bygningur tillagar seg nærumhvørvið, so verandi dygdir ikki verða burturbeindar, men fevndar á jaligan hátt. Ramman um og varðveitingin av steinlandslagnum móti Debesartrøð, og nýgerðin av garðinum móti Nóatúni eru góð dømi um hetta. Í víðari arbeiðinum við verkætlanini er tað av stórum týdningi, at steinlandslagið móti Debesartrøð verður varðveitt.

- Uppskotið hevur eina pragmatiska tilgongd til burðardygd og verða tær sosialu, umhvørvisligu og fíggjarligu støðurnar viðgjørdar á ein góðan hátt í yvirskipaða arkitektoniska hugtakinum. Verkætlanin er eitt kærkomið íkast til eina nýggja, meira eyðmjúka og burðardygga leið innan føroyska byggilist.

Tað er ein fortreyt, at dygdirnar í uppskotinum við rúmskipanini av "rúm í rúminum" og nýtslan av sjónligum timbur yvirflatum verður varðveitt í víðari verkætlanararbeiðinum. Dómsnevndin mælir til at fylgjandi viðurskiftir fáa serligt eftiransni í víðari arbeiðinum.

- Universal atkoma til allar partar av torginum og gøtuni
- Styrking av sambandi millum Debesartrøð og Nóatún (bæði sjónliga og virkisliga)
- Víðari menning innan burðardygd
- Kanning av møguleikum fyri nýtslu av endurnýtslutilfari á framsíðunum (ístaðin fyri kortenstál)
- Virkisbýti og atkomumøguleikar móti Debesartrøð eiga at umhugsast av nýggjum

**2. virðisløn: uppskot nr. 35813 NÓATÚN – Sp/f Kontrast og Cobe**

Hetta uppskotið mælir til at gera eitt grønt landslag á tekjuni av felagsbygninginum, ið liggur sum ein niðursokkin rúmd, ið er grivin út í uppruna lendinum. Felagsbygningurin kann metast sum ein nútímans tulking av siðbundna føroyska byggisiðinum við grótlaðing og flagtekju við mønu, sum liggur natúrligt í landslagnum.

Uppskotið kann dragast fram fyri sína dynamisku útsjónd, sum fyriheldur seg til nærliggjandi bygningar og eina spennandi innara gonguleið, sum tvinnar saman mongu ymsu virkini á Setrinum á natúrligan hátt. Uppskotið inniheldur somuleiðis fleiri góðar hugleiðingar um tilfarsnýtslu, bæði innan og uttan.

At fella uppskotið niður í verandi landslagi kann geva fleiri trupulleikar, eitt nú við at fáa nóg mikið av dagsljósi inn og at sleppa til og fram við bygninginum. Umfatandi lendisarbeiðið tykist at vera óskynsamt í mun til burðardygga evnið.

Lutfalsliga opna rúmskipanin í bygninginum, við nógvum stórum rúmum, er ein styrki í mun til at tryggja rørslu og samanhang millum tær nógvu funktiónirnar á Setrinum. Men hetta gevur samstundis avbjóðingar í mun til at tryggja góð ljóðviðurskifti og innilig arbeiðsøki.

**3. virðisløn: uppskot nr. 15181 KAMPUSGJÓGV – Arkitektar99 og BIG**

Í hesum uppskotinum verður ein samanhangandi bygningsheild skipað um eitt innara tún. Bygningsheildin hevur fingið íblástur í siðbundnu føroysku byggilistini, tí harðrendu náttúruni og gjónni sum náttúruhavn. Stórur partur av bygningsheildini og miðsavnandi túninum eru grivin niður í lendið. Flagtekjurnar eru hugsaðar sum framhald av lendinum. Innara túnið við hellubotni av basalti skapar eitt nýtt lendisrúm.

Talan er um eitt væl úr hondum greitt uppskot, við nógvum góðum hugleiðingum um burðardygd. Uppskotið kann eisini dragast fram fyri sítt arbeiði við miðsavnandi útirúminum, men dómsnevndin er í iva um túnið verður brúkt í nóg stóran mun, orsakað av veðurlagsviðurskiftunum á staðnum. Eisini hevur hendan rúmskipanin við sær, at bygningurin í ein mun vendir nærumhvørvinum bakið og at innara lívið ikki, í nóg stóran mun, verður sjónligt uttanífrá.

At bygningurin samstundis skal grava seg niður í uppruna lendið er ein trupulleiki og gevur eina røð av avbjóðingum, serliga við at draga dagsljós inn í bygningin. Umfatandi lendisarbeiðið tykist eisini sum eitt ógvusligt inntriv í náttúruna, hóast nógv grót verður endurnýtt í verkætlanini.

**uppskot nr. 09052 MILLUM GARÐARNAR – SNA**

Í hesum uppskotinum er felagsbygningurin skipaður sum ein long lon, samansett av fýra gjøgnumskygdum bygningskroppum. Bygningurin verður knýttur at eini røð av evnisgørðum, sum fær samband í lag millum felagsbygningin og nærumhvørvið. Hesir garðar skulu umboða franska, italska, japanska, enska og føroyska havamentan, og vera ímynd av einum altjóða sambandi við umheimin.

Uppskotið kann dragast fram fyri hugskotið at nýta havar sum umráðandi samband millum bygningin og nærumhvørvið, men dómsnevndin er ikki sannførd viðvíkjandi nýtsluni av tilvísingini til altjóða havar. Hugskotið verður ikki lýst nágreiniliga, og góðskan í teimum ymsu útiøkjunum kemur ikki týðiliga til sjóndar í tilfarinum.

Uppskotið vísir á bygningsdygdir í nærumhvørvinum, sum tað hevur ynski um at draga inn í arkitekturin. Dómsnevndin metir hugskotið vera dámligt, men saknar, at tað kemur týðiliga til sjóndar í uppskotinum. Yvirskipað verður sóknast eftir eini greiðari byggilistarligari viðgerð av framsíðum og tekju.

Úr einum burðardyggum sjónarhorni tykist uppskotið ikki at vera nóg væl viðgjørt. Millum annað er ongin støða tikin til, hvussu sólverja og inniumhvørvi verða loyst í glasklædda bygninginum.

**uppskot nr. 31122 NÓAHEYGGUR – Zeta Arkitektar & Brim Arkitektar**

Við hesum uppskotinum fær felagsbygningurin eina samanhangandi grøna tekju, ið skal geva møguleika fyri rørslu og uppihaldi. Tekjan kann metast sum eitt framhald av verandi landslagnum. Somuleiðis letur bygningurin seg upp og bjóðar innum gjøgnum gjøgnumskygdu framsíðurnar. Bygningurin trappar upp og niður við lendinum, sum ger tað møguligt at tillaga stóra bygningin til umhvørvið.

Bygningurin kann dragast fram fyri opna torgið og stóru uppihaldstrappuna, ið gevur eitt framúrskarandi útsýni yvir miðbýin. Tó tykist opna rúmið óloyst í samband við ljóðviðurskifti og fjølbroytni millum innilig og útsett øki. Dómsnevndin setur tí spurningartekin við, um hetta stóra opna rúmið er gagnligt í mun til vanligu nýtsluna av felagsbygninginum.

Hugskotið, at landslagið skal halda fram á tekjuni á bygninginum, er eitt áhugavert sjónarmið, men dómsnevndin metir tað vera ivasamt um tekjan í veruleikanum fer at rigga sum gonguleið og uppihaldsøki.

Sæð úr einum burðardyggum sjónarhorni virkar uppskotið ikki at vera nóg væl viðgjørt. Millum annað er ikki tikið støða til, hvussu sólverja og inniumhvørvi verða loyst í bygninginum, sjálvt um stórir partar av framsíðunum eru úr glasi.

**Uppskot nr. 65159 KAMPUS – MAP Arkitektar**

Í hesum uppskotinum verða tær mongu funktiónirnar í felagsbygninginum samlaðar í eini stórari rúmd við atrium og forskotnum planum. Tann ikoniska "laterna magica" verður eitt kennimerki móti býnum. Bygningurin er ætlaður at gerast ein sameindur partur av grønum sambandi gjøgnum økið og rúmar millum annað einari amfi-trappu, ið vendir sær til steinlandslagið á Debesartrøð.

Uppskotið kann dragast fram fyri tað yvirskipaðu skipan, sum er við til at tryggja eitt gott flóð ígjøgnum bygningin og sum skapar gott samband millum inni- og útiøki. Uppskotið rúmar yvirskipað nógvum góðum loysnum, ið hvør í sær tykjast væl viðgjørdar, men sum ikki endiliga ganga somu leið. Bygningurin kann tí tykjast byggilistarliga óloystur og ikki at hava eitt greitt yvirskipað arkitektoniskt hugskot.

Tað er góður tanki at hugsa bygningin sum ein samantvinnaðan part av einum grønum geira gjøgnum økið. Men við støði í sermerkta bygningsskapinum og staðseting á byggiøkinum, tykist hetta ikki ordiliga at gerast meiri enn ein góður tanki.

Sæð úr einum burðardyggum sjónarhorni tykist uppskotið ikki at vera nóg væl viðgjørt.